

Fyri 35 árum síðan:

## Prógv á Føroya Maskinskúla í 1970

29. apríl 1970 endaði ein maskinpróvtøka á Føroya Maskinskúla, og hesir fingu prógv:

*Aftara rað f.v.: Heðin Hansen, Glyvrar, Karl Anton Thune, Toftir, Ingi Erhardsen, Vágur, Heri av Reyni, Tórshavn, Jón Slættanes, Tórshavn, Mortan J. Hansen, Tórshavn, og Kartni S. Olsen, Sandur*

*Fremra rað f.v.: Kjartan J. Stenberg, Svínoy, Jóannes Christiansen, Klaksvík, Hans Charles Potts, Norðragøta, Jonleif Joensen, Tórshavn, Heri Weihe, Sørvágur, Jákup Berg, Hov, og Hilmar E. Jacobsen, Tórshavn*

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1970*

Havnar leksikon:

# Minkagarðurin í Hoydølum



Hendan myndin er tikin í Hoydølum fyrst í 60-unum. Fremst síggja vit húsini, sum skraddar-Nolsøe bygdi í fyrst í 20-unum, og verða tey framvegis rópt »Skraddarahúsini í Hoydølum«.

Vit síggja eisini minkagarðin hjá P/F Poul Hansen, sum bleiv settur á stovn í 1960, tá komu 350 minkar, og tá talið var upp á tað mesta, vóru teir 17.000 í tali. Hetta virksemið helt uppat í 1969. Minkaskinnini vórðu turkaði á Bacalao á vestaru bryggju. Nevnast kann, at hetta var fyrsti minkagarður í Føroyum við útflutningi fyri eyga.

Leggið til merkis Hvítanesvegin, hvussu smalur hann er. Húsini hjá Torbjørn Sørensen eru tey einastu hinumegin Hvítanesvegin.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesa myndina, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 ella 273168.

*Mynd: Åse Nygaard*